# Kári Skála 60 ár

Mánadagin 3. juli fyllir Kári Skála 60 ár. Kári er føddur, uppvaksin og hevur slitið sínar barnaskógvar í

Dr. Jacobsensgøtu í Havn, yngsti sonur Honnu, f. Thorkildshøj av Nesi, og Óla Kristian Skála handilsmann í Havn.

Eftir lokið realprógv fór Kári niður á sjómansháskúla í Svendborg og víðari sum næmingur við skúlaskipinum

»Georg Stage«. Heimafturkomin var Kári sjómaður eina tíð, var við Sildrekanum við Júst í Trúni sum skipara, í tí góðu sildatíðini í sekstiárunum. Hann var eisini við lílnubátunum Nornagesti og Klakki, til hann gavst at sigla í 1968, og fór at arbeiða hjá pápa sínum. Bleiv so stýrimaður á turra bógnum – har foreldrini sleptu, tók Kári við.

Saman við konu og systur síni eru tey karmurin um P/F Skálabúðina og Mótaskálan.

Stóran áhuga hevur Kári í Havnar Bóltfelag, har hann eisini hevur spælt í dreingjadeildini. Teir vóru á Íslandsferð



1960 – sama árið sum teir gjørdust føroyameistarar. Hann var í nevndini hjá HB-stuðlum í fimm ár, harav tvey ár sum formaður.

Hann var eisini við til at stovna HB-stuðlar í 1979. Kári hevur eisini íðkað fimleik í 20 ár hjá Havnar fimleikarafelag

»Old Boys« liðið hjá Dánjali Húsgarð, nú Torkil Dahl. Kári er morgunmaður, er at síggja hvønn morgun á posthúsinum í miðbýnum og í svimjihøllini hvønn sunnumorgun.

Kári giftist í 1974 við Marin, fødd Hentze, ættað av Sandi. Tey búgva við Hvítanesvegin í Hoyvík og eiga tey tvey børn: Kristian Martin, giftur við Rannvá, f. Dalsgarð avArgjum, tey búgva á Hamrinum á Argjum, og Súsanna, gift við Brandi Jacobsen av Glyvrum, tey búgva í Syðrugøtu. Eisini eigur Kári seks abbabørn: Kára, Bjarna, tvíburarnar Ragnar og Rógva, Óla Kristian og Marin.

Í sambandi við føðingardagin hevur Kári opið hús við morgunmati í HB-húsinum millum kl. 11.00 og 15.00, har hann vónar at síggja nógvar vinir og kenningar.

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Diana Hansen, Klaksvík**, andaðist týsdagin, 80 ára gomul. Kistan fer úr Kapellinum á Klaksvíkarsjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesta leygardagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Dianu, kunnu lata eina peningagávu til Zarepta; konta í peningastovninum.

Kistan við **Henning Joensen** fer av Ellisheiminum í Miðvági í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju leygardagin 1. juli kl. 13. Tey, ið vilja minnast Henning, kunnu lata eina peningagávu til Miðvágs kirkju.

**Petur Sjúrður Thomsen** úr Nesi í Hvalba andaðist á Sambýlinum í Hvalba hósdagin 29. juni, 84 ára gamal. Farið verður úr kapellinum leygardagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju sunnudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Sjúrð kunnu lata Sambýlinum eina gávu. Konto í peningastovnunum.

# Ein modernað mamma fyllir 80

Øll barnaárini vart tú mín stóra fyrimynd. Tú gekk heima og hevði altíð okkurt gott til okkum Heina og meg, tá vit komu úr skúlanum.

Í mínum barnaárum nýttu gentur tyll og ljósareyð pløgg. Eg afturímóti nýtti cowboybuksur og gular løriftsskógvar.

Tá tað regnaði, spældu vit inni. Tú teknaði eitt flogfar við kriti á køksgólvinum, og so lakkaðu vit.

Tú vart livandi og aktiv.

Minnist tey kvøldini, tá sjónleikarafelagið trenaði úti hjá okkum og so spenningur tá tit fóru á pall.

Tað var ikki bert sjónleikurin, ið hevði tín áhuga. Systir tín Tove, Frodina og tú, stovnaðu bólkin Sputnik. Tove spældi klaver, Frodina trummur og tú harmoniku.

Enn er alt, tú tókst við, ikki nevnt.

Ítrótturin hevði títt hjarta. Tú spældi hondbólt og var ein framúrskarandi svimjari. Tú lærdi øll børnini í grannalagnum at svimja á sjónum og yngsti beiggi okkara, gjørdist ein hin besti svimjari í kongaríkinum, inspireraður av tær

**Ingrid**



✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at elskaða kona, mamma, omma og langomma

**Diana Hansen**
Klaksvík

fór heim til Harran týsdagin 27. juni, 80 ára gomul.

Kistan fer frá kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, fríggjakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Esmar, Anna, Malena, Óla Jákup og Jógvan Kári**

*Tey, ið vilja minnast Dianu kunnu lata eina peningagávu til Zarepta.*

# Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum gjørdu gullbrúdleypsdag okkara so minnisríkan.
Takk til tykkum, sum sungu um morgunin.
Takk til tykkum í Missiónshúsinum.
Takk til øll, sum hjálptu til og til øll tykkum, sum komu á gátt. Eisini hjartaliga takk fyri heilsanir vit fingu.
Harrans ríku signing.

**Elsa og Jógvan Petersen, Kollafjørður**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góði maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Sigmund Arge Gregoriussen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til Hera Joensen, prest. Tøkk til Rúnu á Heygum og Herluf Lützen fyri sangin í kirkjuni
Tøkk til sangarnar
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Ein serstøk til tykkum á B6,ið vóru um hann.
Og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum seinasta teinin.

*Familjunnar vegna*
**Karen, Birna og Beinta**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Petur Djurhuus**
Tórshavn
ættaður av Nesi, Vági

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk til talarar, sangarar og spælarar.
Tøkk fyri minnisgávur til Zarepta.
Tøkk til tykkum, sum sendu blómur og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her.

*Vegna tey avvarðandi*
**Karin, Lis og Eyðvør**

Sosialurin -har tað hendir